# SERARBEIÐARASÁTTMÁLI

**Millum**

**Føroya Arbeiðsgevarafelag**

**og**

**Føroya Arbeiðarafelag/**
**Havnar Arbeiðskvinnufelag**

Vísandi til §14 í høvuðssáttmálanum og ásannandi at arbeiðsmynstur, sløg av arbeiði og neyðugar dygdir alsamt broytast, eru partarnir komnir ásamt um at gera hendan serarbeiðara-sáttmála til tess at tryggja eina skikkaða arbeiðsmegi fyri serstøk arbeiði og ein meira liðiligan arbeiðsmarknað.

## § 1

Fyri handlig arbeiðir, sum ikki eru serliga nevnd í §1 til 4 í høvuðssáttmálanum, og sum krevja venjing og útbúgving, eru hesi fevnd av serarbeiðarasáttmálanum.

Hópframleiðsla av betonelementum, aluminiums- og plastvindeygum, pakkitilfari, rútaglasi, glastrevjulutum og bygningselementum.

Montering av stál-, beton- og timburelementum og onnur monteringsarbeiðir. Uppsetan av stilladsum. Áleggjan av takpappi og gólvbelegningi.

Forskalling við kasettuformum, uppsetan av kantsteinum og áleggjan av betongflísum, legging av kloakkrørum.

Arbeiði í timburhandlum við rammusagum, høvlum, plátusagum, kantfresarum og rundsagum í samband við tilgerð av plátum og timbri til útflýggjan.

Viðlíkahald, umvælingar og stillingar av amboðum og maskinum.

## § 2

Lønin fyri frammanfyri nevndu arbeiðir verður ásett soleiðis:

Tímaløn 1. árið - ið verður at rokna sum yrkisvenjing: Sambært §1a.
Tímaløn 2. árið og síðan - við yrkisvenjing sb. arbeiðsgevaraváttan: Sambært §1a + 2,06 % um tíman.

Fastløntir serarbeiðarar við yrkisvenjing verða løntir sambært §1a + 2,06 % um tíman ferðir 173,33 tímar um mánaðin.

Aldursmarkið fyri at byrja yrkisvenjing er 18 ár.

## § 3

Arbeiðsgevari skal hava skyldu til at geva arbeiðaranum skrivliga váttan um, nær yrkisvenjingin er byrjað, og hvussu leingi viðkomandi hevur starvast í arbeiði, sum telur við sum yrkisvenjing.

Partarnir seta í felag upp orðingina av slíkari arbeiðsgevaraváttan. Arbeiðsgevarin hevur ikki skyldu til at geva arbeiðsgevaraváttan fyri arbeiði, sum samanhangandi ikki hevur vart í minsta lagi 6 vikur.

Miðað verður ímóti at skipa fyri ástøðiligari og handligari frálæru fyri tey ymisku serarbeiðaraøkini, tá møguleikar eru til tess.

**§ 4**

Hesin sáttmáli forðar ikki fyri, at samstarvið millum arbeiðsmenn, serarbeiðarar og handverkarar verður at praktisera, sum tað higartil hevur verið á teimum ymsu arbeiðsplássunum og í teimum ymsu arbeiðunum.

**§ 5**

Har serstakar ásetingar ikki eru gjørdar í hesum sáttmála, fylgja partarnir høvuðs-sáttmálanum, sum er galdandi partanna millum.

**§ 6**

Hesin sáttmáli tekur við 1. mai 2003. Viðvíkjandi uppsøgn fylgir hann høvuðssáttmálanum.

Tórshavn, tann 6. mai 2014

Føroya Arbeiðarafelag/Havnar Arbeiðskvinnufelag

Føroya Arbeiðsgevarafelag